# Útlesa til Fíggjarskipan Landsins (FSL)

NEMA LUNDIN

Dagført: 12-10-2016

# Innihaldsyvirlit Síða

| | |
|---|---|
| Frágreiðing | 3 |
| 1. Test útlesing | 4 |
| 2. Læs tíðarskeiðið | 5 |
| 3. Endalig útlesing | 6 |
| 4. Vegleiðing til test og innlesing av roknskapi | 7 |

**Frágreiðing**

At útlesa til Fíggjarskipan Landsins (FSL) gera allar kommunur sum skullu innraportera til landið.

Vanligt er at gera eina test útlesing tá mánaðurin er liðugur, sum síðan verður send til FSL.
Tá fráboðan er komin frá FSL, um at alt er ílagi, skal tíðarskeiðið læsast og síðan skal útlesast av nýggjum.

## 1. Test útlesing

Liðugt er nú at bóka t.d. Januar tíðarskeið 2016-01.

Og skulu vit tískil senda eina test fílu til FSL at eftirkannað, áðrenn vit læsa tíðarskeiðið.

Vit velja: **Eksport->Fíggjarsk. Landsins.**




Síðan skal veljast:

Tíðarskeið: Her velja vit 2016-01

Leið til fílu: Tað er har fílan skal goymast í tíni teldu ella á servara. Soleiðis at tú kanst innlesa fíluna í FSL ella senda hana í t-posti til FSL.
Við at trýsta á tøppin útfyri leiðina ber til at velja rættað staði..
Her er valt at leggja fíluna á C:\FSL\

Fílnavn: Hetta innsetur skipanin sjálv.
Er tíðarskeiðið ikki læst kemur Test fremst í fílunavnið.

Standard Stovnur fyri statusbókingar uttan dimensión:
Vanliga er hetta dimensión nr: 01111470001, Nøvnini kunna vera ymisk, Kommunukassin v.m í døminum her eitur dimensiónin Standar stovnur fyri bókingar uttan dim.

So er klárt at útlesa. **Vel OK**




Tá skipanin er liðug at útlesa, verður hesin rútuin burtur.
Í **4.** er vegleiðing til hvussu fílan verður send til FSL at eftirkanna.

## 2. Læs tíðarskeið.

Nú er fílan innlisin og testa av FSL og afturmeldindin frá FSL er at alt er ok,  so skulu vit læsa tíðarskeiðið, áðrenn útlisið verður endaligt.

**Ger soleiðis:** Vel Uppseting->Tíðarskeið




Markerað Roknskaparár 2016, og síðan tíðarskeið 2016-01, og vel broyt.




Set flugubein í *Tíðarskeið er læst* og vel OK.




og nú er tíðarskeiði læst og lita grátt. Vel gevast.

## 3. Endalig útlesing

Liðugt er at bóka t.d. Januar tíðarskeið 2016-01.
Testfílan góðtikin av FSL, og tíðarskeiðið læst .

Og vit skulu útlesa endaligt.

Vit velja: **Eksport->Fíggjarsk. Landsins.**




Síðan skal veljast:
Tíðarskeið: Her velja vit 2016-01

Leið til fílu: Tað er har fílan skal goymast í tíni teldu ella á servara. Soleiðis at tú kanst innlesa fíluna í FSL ella senda hava í t-posti til FSL.
Við at trýsta á tøppin útfyri leiðina ber til at velja rættað staði..
Her er valt at leggja fíluna á C:\FSL\

Fílnavn: Hetta innsetur skipanin sjálv.

Standard Stovnur fyri statusbókingar uttan dimensión:
Vanliga er hetta dimensión nr: 01111470001, Nøvnini kunna vera ymisk, Kommunukassin v.m
í døminum her eitur dimensiónin Stand stovnur fyri bókingar uttan dim.

So er klárt at útlesa. **Vel OK**




Tá skipanin er liðug at útlesa, verður hesin rúturin burtur.
Í **4.** er vegleiðing til hvussu fílan verður send til FSL.

## 4. Vegleiðing til test og innlesing av roknskapi

Roknskapargóðkenningarskipanin (RGS) er at finna á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.




1) Fyrst av øllum verður roknskapur útlisin úr bókhaldsskipanini og goymdur í einari mappu, har sleppast kann eftir honum gjøgnum RGS.




2) Trýst á pílin beint við 'Send nýggja fílu'.
3) Trýst á 'Gennemse' og finn fram til roknskapin, sum skal innlesast.
4) Vanliga burdi røtt kommuna staðið í teiginum 'Skjalaslag'.
5) Trýst síðan á send, fyri at senda til RGS skipanina.

Tá roknskapurin er sendur, sær myndin soleiðis út:



6) Trýst á góðkenn. Her verður fílan kannað.
7) Um tað er okkurt í roknskapinum, sum RGS vil siga frá, kemur ein lítil rútur upp, og sigur frá, at feilur er í roknskapinum. Trýst á OK.
8) Um RGS ikki rennur seg í nakað, verður roknskapurin sendur avstað til bókhaldsskipanina hjá Gjaldstovuni, um trýst verður á 'Góðkenn' einaferð afturat, eisini um talan er um testfílu.
9) Fyri at síggja testúrslitið, skal trýstast á fílunavnið í kolonnuni uttast til vinstru.

Vindeygað, har feilfráboðanirnar eru, sær út, sum myndin niðanfyri. Her sæst, at RGS heldur feil verða í onkrum bókingarlinjum, og í onkrum avstemmingum. Fyri at síggja sjálvar feilirnar, skal klikkjast á støðuna 'Feilur' út fyri eina bókingarlinju, fyri at vita, hvat er galið við bókingarlinjuni. Fyri at síggja hvørjar avstemmingar, tað er galið við, skal trýstast á 'Feilur' út fyri 'Góðkenning' úti til vinstru.




10) Fyri at koma til sjálvar feilirnar í bókingarlinjunum, skal trýstast á støðuna 'Feilur', sum er kolonnan uttast til vinstru.

Á hesi myndini sæst, at galið er við standardroknskaparkontuni (STRK). Og í bókingarlinjuni síggja vit, at talan er um strk 0360.



11) Er feilur við undirkontuni, kann man velja at fáa RGS at vísa eina kolonnu við øllum undirkontunum. Tað verður gjørt við at klikkja á 'View', 'Columns', 'Manage Columns', 'UK' og '>'. Síðan kann man velja, hvar UK-kolonnan skal vera í listanum, við at klikkja á pílarnar upp og niður.




12) Fyri at koma til feilmeldingarnar viðvíkjandi avstemmingum og øðrum, skal týstast á 'Feilur' út fyri 'Góðkenn' í vinstru síðu.

Á hesi myndini sæst, at RGS heldur, at ójavni er á rørsluni á 7130/7630 tilsamans og ávísar bókingar á kommunuavrokningini. Fráboðanin sigur, hvat stendur í roknskapinum, og hvat RGS finnur á kommunuavrokningini (KAD).


Validering

View ▾ Detach

| Úrslit | Regla | Koyring | Lýsing |
|---|---|---|---|
| ERROR | 50: Avstemma avrokningarslag 1 | 12/3/2015 | Rørsla á 7630 og 7130 er: -150.825,00. Rørsla í KAD fyri hesa kontu er: -154.993,00 |
| OK | 19: Rentuinntøka skeivt bókað | 12/3/2015 | |
| OK | 20: Persónsskattur bókaður skeivt | 12/3/2015 | |
| OK | 21: Felagsskattur bókaður skeivt | 12/3/2015 | |
| OK | 22: FAS-stuðul | 12/3/2015 | |
| OK | 23: Grein 25 | 12/3/2015 | |
| OK | 25: Kanna um løga er bókað á RKST og AN | 12/3/2015 | |
| OK | 26: Ognir og avskrivingar eru ikki í lagi | 12/3/2015 | |
| OK | 30: Avstemma 0330 í roknskapi við 0330 í I | 12/3/2015 | |
| OK | 31: Avstemma 0331 í roknskapi við 0331 í I | 12/3/2015 | |
| OK | 47: Avstemma 0841 við 0365 | 12/3/2015 | |
| OK | 48: Avstemma 0842 við 0366 | 12/3/2015 | |
| OK | 49: Avstemma 0843 við 0367 | 12/3/2015 | |
| OK | 32: Musikkskúlar | 12/3/2015 | |
| OK | 33: Frítíðarundirvísing | 12/3/2015 | |
| OK | 34: Endurgjald lærlingar | 12/3/2015 | |
| OK | 35: MVG-endurgjald | 12/3/2015 | |
| OK | 36: Forskatting av pensiónum | 12/3/2015 | |

Hetta eru so feilfráboðanir, sum man má taka støðu til, áðrenn roknskapurin kann sleppa ígjøgnum.

Meginreglan, sum miðað verður eftir, er, at øll hesi viðurskifti skulu vera ílagið, áðrenn roknskapurin verður innlisin.

Men tað eru støður, har undantøk mugu gerast, t.d. um talan er um rættingar á haldgóðum grundarlag. Eitt annað dømið er, um móttakarin av einum kravið í KMR drálar við at leysgeva. Hesi undantøk fáast frá Gjaldstovuni.

Hvørjaferð man trýstir á ’Góðkenn’ knappin, ger RGS eina kanning av roknskapinum. Er eingin feilur í roknskapinum, kann man trýsta á ’Góðkenn’ knappin einaferð afturat. Tá verður roknskapurin sendur til bókhaldsskipanina hjá Gjaldstovuni. Innlesingin til bókhaldsskipanina fer fram sjálvvirkandi. Men sum nú er, verður roknskapurin posteraður manuelt. Men tað er væl møguligt, at hann kann posterast sjálvvirkandi í framtíðini.




Ein fíla, sum liggur í RGS, men sum ikki skal brúkast meir, kann slettast við at trýsta á ’Strika’. Bara minnast til at standa í rættari linju, um man hevur fleiri fílur í RGS.

Góða eydnu!